sum tað so ofta er hjá Steffani Danielsen, sum lýsir hendingina uttanífrá í stórari frástøðu til hendingina. Málihátturin er slættur og radikalt foreinklaður sum í popplistini hjá David Hockney; (hann málaði í 1967 kenda verkið "A bigger splash", sum hetta minnir um). Men er myndamálið einfalt, hevur myndin fleiri innihaldslig løg á sama hátt sum vit kenna tað í ævintýrunum hjá H.C.Andersen, sum kunnu lesast beinleiðis í barnahædd, men sum eisini innihalda djúpari tilveruligar og listarligar tulkingarmøguleikar. Í fyrsta lagi lýsir myndin eina spennandi løtu hjá børnunum, sum standa kring bálið og fylgja við í virkseminum kring eitt nýggjársbál. Men av tí, at myrkrið fyllir so nógv og frástøðan er so stór, gerst huglagið alt fyri eitt heldur dapurt. Avbyrgingin og einsemi gerst onkursvegna dupult í hesi myndini, har málarin tykist útihýstur bæði úr húsunum og frá uttandura hendingini. Tað er møguligt, at hann útihýsir seg sjálvan, men óansæð er einsemiskenslan sterk í myndini, eisini orsakað av, at myndaliðirnir fyri tað mesta upptraðka í pørum – hetta kann væl hanga saman við harmonisku myndakenslu málarans og hansara lyndi til at síggja dekorativ mynstur í øllum – men vit síggja altso tvey og tvey hús, tveir pelar, tveir tráðir og tvey børn, sum vísir á ein grundleggjandi felagsskap, sum áskoðarins saman við málaranum eru útihýst frá. Um vit hyggja at bygnaðinum, er hann statiskur burtur sæð frá kyndlinum, sum skapar dynamikk og dramatikk í monumentalu heildini. Hetta hevði verið ein øgiliga tung mynd, var tað ikki fyri smágentuni í reyðu troyggjuni, sum ikki er heilt so anonymiserað sum hini pinnafólkini á myndini. Gentan fær stóran myndaligan týdning bæði við fokuseraðu staðsetingini og við heita reyða litinum, sum er komplementererur til blágrønu heildin. Gentan er eisini staðsett eitt sindur nærri okkum og málaranum; hon dregur eygað inn í myndina, hon fjálgar myndarúmið og skapar hita og møguleika fyri identifikatión hjá áskoðaranum.

## Ikki so góðvarin

Eftir at hava viðgjørt Nólsoyarmálaran var Kinna Poulsin sera bilsin av at síggja, hvussu raffineraðar myndir hann málaði.

- Hann er serstakur, men kanska ikki heilt so góðvarin, sum hann hevur verið hildin at verið, staðfesti Kinna og vísti til metingina hjá Bárði Jákupsson í bók síni um Mikines, at Steffan Danielsen í onkran mun hevur verið hugkveiktur av Mikines. Í bókini skrivar Bárður Jákupsson soleiðis:

"*Ingálvur greiðir frá, at einaferð teir fyrireikaðu eina Ólavsøkuframsýning – hetta var í 1951 ella 52 – tá kemur Steffan Danielsen úr Nólsoy inn, undir ørmunum hevur hann rullur við málningum og báðar hendur fullar við. Hann setti teir frá sær og fór beint yvir til Mikines, fór at greiða frá stóru framsýningini, Mikines hevði havt í 1938. Hann greiddi gjølla frá hvørjari einstakari mynd, portrettmálningum, landsløgum, dugdi at siga, hvar hvør mynd hekk. Alt hevði hann varðveitt í minninum...*".

Sambært Kinnu kundi hesin tilburður kundi bent á, at Steffan Danielsen, sum í 1938 var sekstan ára gamal, veruliga hevði eyguni við sær á listaframsýningum, at hann longu blaðungur hevði eitt ómetaliga gott visuelt minni.

## Tað, sum onnur ikki varnaðust

Viðgerðin hjá Kinnu Poulsen tekur støði í lýsingini, sum William Heinesen hevur av Steffani Danielsen í bókini "Føroysk list", men harumframt hevur hon eisini fingið góða hjálp frá ymiskum fólki, ið hava kent Nólsoyarmálaran.

- Eg havi til dømis fingið hjálp frá listafólkum sum Zacharias Heinesen, sum jú minnist tá Steffan á fysta sinni kom við sínum myndum, tá teir vóru við at hanga Ólavsøkuframsýningina upp. Tað er fantastiskt at hava tílík professionel fólk at taka til – tey eru jú livandi keldur til okkara listasøgu og eg eri sera takksom fyri samrøðuna, Zacharias. Eg náddi eisini at gera eitt áhugavert viðtal við Janus Kamban sála; ein klókur maður, ið dugdi væl at orða seg. Steffan Danielsen - segði hann – "*var ógviliga merkiligur maður, sum hevði eyga fyri teimum løgnastu myndevnunum. Hvagar hann fór, fann hann myndevni, sum eingin annar sá, í Nólsoy, í Havn og tá hann so fór niður til Danmarkar, gjørdi hann tað sama har. Hann málaði enntá myndir úr flogfarinum*".

Tey løgnu og eyðmjúku myndevnini, sum at síggja til ikki høvdu nógv uppá seg – ein húsatoft, ein varði, hegnpelar, elsteyrar og tílíkt, vit vanliga ikki leggja til merkis, gjørdist hjá Steffani Danielsen høvið til at skapa sonn meistaraverk.



*- At Steffan Danielsen var so egin, sum listamálari, hekk uttan iva eisini saman við at hann var sjálvlærdur, segið John Dalsgarð, sum hevur lagt bókina til rættis.*



*Óvanliga nógv fólk høvdu leitað sær oman í hølini hjá Steinprent til framløguna av bókini um Steffan Danielsen*

Hann dugdi at síggja nakað, har eingin annar tímdi at hyggja og bar við sínum málaðu tulkingum fram eina poesi, sum stendur sterk, eisini fyri nútíðar áskoðaran. Hetta eru myndir, ið tola tíðarinnar tonn og sum hava ein serligan nútíðarligan dám, sum eyðkennir modernaða dygdarverkið.

## Ein gáva

At enda nýtti Kinna Polsen høvið at takka Emil Thomsen, soni hansara Bjørn og versoninum John fyri álitið og legði afturat

- Nú skal eg lata vera við at ummæla meg sjálva, men allíkavæl tori eg at halda uppá, at hendan bókin er ein gáva til okkum øll við teimum gott hundrað Steffansmyndunum, sum vit nú kunnu fara heim og hvør í sínum lagi njóta og granska.






*Meir enn 100 myndir eru við í bókini um Steffan Danielsen, sum Emil Juul Thomsen hevur tikið stig til og Kinna Poulsen, listaummælari, hevur skrivað tekstin til*